# Havnar Fimle



*Styrki og smidligheit spælir í nógv størri mun ein høvuðsleiklut, tá talan er um estetiskan fimleik heldur enn rútmiskan*




*A-liðið hjá Havnar Fimleikafelag gjørdist fyrsti føroyameistarin í estetiskum fimleiki. Sigurin var eisini rudd*

**Fríggjakvøldið var ítróttarhøllin á Nabb karmur um ta fyrstu FM kappingina í estetiskum fimleiki fyri gentur**

FIMLEIKUR
*Liv Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur*

Hóast veðrið ikki var av tí besta, var nógv fólk komið saman í ítróttarhøllini á Nabb fríggjakvøldið. Fyri fyrstu ferð nakrantíð skipaði Føroya Fimleikasamband fyri FM kapping í estetiskum fimleiki. Kappingin hesaferð var fyri gentur. Liðini, sum kappaðust, vóru tvey úr Havnar Fimleikafelag, eitt úr Støkk og eitt úr Ljósinum.

## Styrki og smidligheit

Høllin var sera vakurt pyntað við blómum og øðrum. Eitt serligt gólv var lagt á, umframt at ljós bert var á miðjuni á gólvinum, soleiðis at tað einans vóru fimleikararnir, sum vóru í miðdeplinum. Hetta gjørdi eisini, at genturnar ikki vórðu órógvaðar, ímeðan tær framførdu.

Estetiski fimleikurin krevur annað og meira av fimleikarunum enn hin vanligi rútmiski fimleikurin, sum vit eru von við. Genturnar skulu vera sterkar og sera smidligar, umframt at tær skulu hava orku til at liva seg inn í rørslurnar og tónleikin, meðan tær framføra.

Tað er ikki bara at siga tað at skifta fimleikagrein frá rútmiskum til estetiskan fimleik. Umframt fimleikarar og venjarar, verða dómararnir eisini ávirkaðir. Alt er nýtt hjá øllum, bæði rørslur, venjingar og ikki minst reglugerðin. Tí hava nakrir dómarar verið uttanlands á skeiðum, har teir hava sett seg inn í reglugerðina og mannagongdir annars í sambandi við dømingina.

## Stiggevingin

Liðini fáa trý met; eitt tøkniligt, eitt listarligt og eitt fyri framførsluna. Tøkniliga metið er í mesta lagi 6,00 stig, sum verða givin, um ymisk krøv um kropsrørslur, javnvágir og lop verða uppfylt. Listarliga metið er í mesta lagi 4,00 stig, sum verða givin eftir, hvussu tónleikur og rørslur hanga saman, um fimleikararnir megna at gera íðkaninar til fulnar o.s.fr. Dømingin av framførsluni er øðrvísi enn hinar, við tað at liðini hava 10,00 stig, tá tey fara út á gólvið, og síðani verða stig drigin frá so hvørt, sum okkurt miseydnast hjá fimleikarunum.

Í estetiska fimleikinum verður stórur dentur lagdur á útsjóndina. Liðið skal vera ein heild; rørslur, tónleikur, draktir, hár og smyrsl skal alt vera ein eind, ein vøkur heildarmynd. Tað sást eisini fríggjakvøldið, at genturnar høvdu gjørt nógv burturúr. Allar høvdu somu hárseting, vóru smurdar líka, umframt at vera í sera vøkrum draktum, sum eru bílagdar til endamálið.

Kappingin var hørð og jøvn; tó skaraði eitt lið framúr, og tað var lið A hjá Havnar Fimleikafelag, sum vann